


# Teir & Tara

Handilin Teir og Tara læt fyri kortum upp á Hálsi. Talan er um handilin Jungmann frá Saltangará, sum hevur latið upp í Havn við eini konufólka- og eini ungdómsdeild eisini. Tey siga, at serliga damudeildin hevur verið serliga væl móttikin, og at tilkomin konufólk úr Havnini veruliga hava saknað ein slíkan handil.

Tey hava alskyns klæðir. Bæði gerandis, klassisk og fín. Fleiri av merkjunum sum handilin selur, eru bert at fáa har, og tey eru sera væl umtókt.

Teir og Tara er býttur upp í trý, við eini ungdommiligari deild, har tað eru sterkirlitir, sonevndar pangfarvur og copwboybuksir, ið fylla hyllarnar.

Eisini er ein harradeild, ið somuleiðis hevur gerandis og fín klæðir. Eisini innan mannfólkaøkið hevur handilin einarætt uppá nøkur merki. Til mannfólk eru eisini nakrir skógvar at fáa, og sagt verður, at tað er nakað tey ætla at fara at gera meiri við.

Konufólkadeildin er rættað til tilkomnu kvinnuna, og hevur merki sum Bianca, Creton og Bohéme. Tað er kanska serliga hendan deildin, ið tykist draga kundar. Her eru nevniliga smørt og øðrvísið klæðir, ið ikki eru serliga dýr. Okkurt ber brá av Munthe plus Simonsen stílinum.

Teir og Tara selir eisini accessories so sum penar smúkkur, belti, taskur, plastik armbond og ringar í neonfarvum.

Her er nakað fyri øll at heinta, bæði mann- og konufólk, óansæð aldur.

[ TEIR ] & [ TARA ]

STARAVEGUR 9 · TÓRSHAVN · TEL 322202

Sosialurin 341800



Tað nýggjasta nýggja innan brúnking av húðini,
er nú eisini at fáa í Liljuni. Talan er um
Sun Mist Airbrush Spray,
ið er sjálvbrúnari, ið verður
sprayaður uppá húðina
í einum tunnum,
jøvnum lagið.



Fyrimunurin við hesum viðgerðarhátti er, at tað ikki skaðar húðina uppá nakran máta. Eingin vandi er fyri, at húðin eldist ella at tú fært krabbamein.

Av tí, at sjálvbrúnarin verður sprayaður uppá húðina, leggur brúni liturin seg javnari um kroppin, enn tá vanligur sjálvbrúnari verður smurdur á og tískil er vandin fyri, at liturin gerst ójavnur ikki serliga stórur.

Ì Liljuni mæla tey til, at tú fert í bað áðrenn viðgerina og ikki hevur nakran deodorant ella perfumu á kroppinum. Sprayið tekur eini 10-15 min at torna, alt eftir húðtypu. Tey halda tað vera best, um tú ert í bumullsklæðum tá tú kemur til viðgerðina. 8-10 tímar eftir viðgerina verður mælt til at fara í brúsu at skola evt. yvirskotslit av kroppinum. Brúni liturin heldur í uml. eina viku, alt eftir hvørja húðtypu tú hevur. Eisini ávirkar tað, hvussu ofta tú vaskar tær við sápu.

Viðgerin í Liljuni kostar 260 kr fyri allan kroppin. 100 kr fyri andlitið og 150 fyri andlitið, bringuna og eitt sindur út á armarnar. Annars siga tey, at tey vurdera prísin fyri andlit, armar og bringu eitt sindur, alt eftir hvussu nógv tú ynskir sprayað.

**Salong Liljan**
Torfinsgøta 6 · Tórshavn · Tel 31 47 68

Sosialurin 341800



# Hárfríðkanarskúlin




Sosialurin 341800

| | |
|---|---|
| Damuklipp | 200,- |
| Harraklipp | 150,- |
| Børn | 100,- (børnini fáa ballón) |



| | | |
|---|---|---|
| | Flættur | frá 200,- |
| NÝTT: | Tourist krúllur | frá 170,- |
| | - við permanent | frá 350,- |

HÁRFRÍÐKANARSKÚLIN
Tórfinsgøta 6 · Tel 31 47 68 · Fax 31 88 47




# Tingmenn altíð klárir

**Løgtingsarbeiðið er komið til ein enda í hesi tingsetuni. Tað varð ein drúgv tingseta við eini seinkaðari fíggjarlóg og fleiri fyrispurningum. Løgtingsformaðurin sigur, at fleiri mál komu á skránna, tá tingsetan varð so drúgv. Hann sigur eisini, at kongliga brúðleypið hevur ikki nervað tingið, og at Føroya Løgting altíð er til reiðar. - Tingmenn eru altíð klárir, sigur Edmund Joensen**

FØROYA LØGTING

*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*



*Tingið er í prinsippinum altíð saman nú. Setan er frá ólavsøku til ólavsøku. Tingið er altíð arbeiðsført, og løgtingsnevndirnar eru altíð arbeiðsførar. Um okkurt stingur seg upp, so er alt tókt. Tingmenn eru altíð klárir, sigur løgtingsformaðurin Edmund Joensen*

Tá Sosialurin prátaði við løgtingsformannin Edmund Joensen fyri nøkrum vikum síðani, 15. apríl, var nógv at gera á Føroya Løgtingi. Fleiri tingmál vóru á skránni, og fíggjarlógin var enn ikki komin úr fíggjarnevndini.

Men nú er fíggjarlógin samtykt, og tingið hevur avgreitt tey flestu málini.

– Nú stendur nógv betur til. Tað er bert ein triðja viðgerð og tvær aðru viðgerðir, sum er á skránni í tinginum í dag, týsdagin, umframt nakrir fyrispurningar, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður.

Edmund Joensen væntar, at Føroya Løgting kann fara í summarfrí týsdagin, um onki óvæntað kemur fyri tingið.

Hóast tingarbeiðið hevur gingið væl seinnu vikurnar, eru tvey tingmál tó ikki komin úr nevnd. Talan er um uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum um gransking, sum er uppskot til samtyktar. Og uppskotið til samtyktar hjá Bárði Nielsen og Føroya Landsstýri um einskiljing av Føroya Banka er heldur ikki komið úr nevnd. Onki røkist fyri, at hesi mál koma úr nevnd áðrenn ólavsøku, og tískil detta uppskotini niðurfyri.

## Astrup setti dagsskránna

Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, segði við Útvarp Føroya mánakvøldið, at hann ætlar at leggja nýtt uppskot fyri tingið í næstu tingsetu um einskiljing av Føroya Banka.

– Mín ætlan er, at málið kemur aftur í tingið í heyst, segði Bárður Nielsen.

Tað varð annars Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka, ið setti dagsskránna, tá hann í drúgvari samrøðu við Sosialin úttalaði seg um ætlanirnar hjá Føroya Landsstýri um at einskilja Føroya Banka (Sosialurin, 29. apríl 2004).

Jørn Astrup vísti á, at bankin átti at verðið tikin við upp á ráð, og at uppskotið var ein misskiljing. Og nú er uppskotið á ein hátt tikið aftur, tí tað fellur burtur aftaná ólavsøku, um onki óvæntað hendir.

– Skipanin er soleiðis, at um tað ikki verður tingfundur aftur fyrr enn á ólavsøku, so er nýggj tingseta, og so fellur uppskotið burtur, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður.

Hitt málið, sum ikki er avgreitt enn, er uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum um gransking, sum varð beint aftur í nevnd.

– Tað málið er ikki komið aftur úr nevnd, og kemur helst ikki aftur úr nevnd og fellur helst eisini burtur, sigur Edmund Joensen.

Uppskotið um gransking er ikki eitt lógaruppskot, men eitt uppskot til samtyktar um "miðvís framtøk fyri gransking, tøkni og menning í Føroyum."

– Men so skuldi eisini verið slætt borð. So er spurningurin, um tingarbeiðið kann gerast liðugt í dag, týsdagin, um tingið ynskir tað. Eg havi mett tað soleiðis, at tað verður liðugt í dag, sigur løgtingsformaðurin.

## Alt er treytað av fíggjarlógini

– Alt hongur eitt sindur saman við fíggjarlógini, og fleiri mál eru treytaði av fíggjarlógini. Summi mál skulu verða samtykt, fyri at fíggjarlógin skal stemma. Barsilsskipanin, til dømis, har er talan um nokkso nógvar pengar, sigur løgtingsformaðurin, tá hann verður spurdur, um tunga viðgerðin av fíggjarlógini hevur nervað tingarbeiðið.

– Við tað, at setanin verður nokkso drúgv, so koma eisini fleiri mál av teirri orsøk. Andstøðan skal jú eisini markera seg. Tað er nú einaferð uppgávan hjá andstøðuni at fáa alt fram í ljósið, sum kann fáast fram. Og tað er nú einaferð leikluturin, líka mikið hvør tað er, sum situr í andstøðu og samgongu, at samgongan fer eitt sindur lætt um tað. Ella tað heldur andstøðan í øllum førum. Og av tí sama ger andstøðan sítt fyri at hála ymsu tingini fram, og tað er jú bara gott fyri fólkaræði, sigur Edmund Joensen.

## Kongligt brúðleyp ávirkaði ikki Løgtingið

Edmund Joensen var ein av teimum føroyingunum, som fóru í kongliga brúðleypið í Keypmannahavn fríggjadagin. Edmund fór sjálvandi av landinum, áðrenn sjálvan brúðleypsdagin.

Hetta hendi alt, meðan fíggjarlógarviðgerðin stóð upp á tað hægsta, men Edmund Joensen sigur, at tað ávirkaði ikki viðgerðina av fíggjarlógini, at sjálvur løgtingsformaðurin og løgmaður ikki vóru til staðar á Føroya Løgtingi, tá landsins týdningarmesta lóg skuldi kjakast, tillagast, og samtykkjast.

– Alt var so øgiliga væl fyrireika. Nú fall tað soleiðis, at fíggjarlógin kom aftur úr fíggjarnevndini ta vikuna, sum kongliga brúðleypið var á skránni. Og brúðleypið fingu vit ikki útsett, og hinvegin vildu vit ikki útseta fíggjarlógina, tí tað var jú ein provisorisk fíggjarlóg galdandi, og alt landið bíðaði eftir einari nýggjari fíggjarlóg. Og vit vildu ikki seta fíggjarlógini út av tí orsøkini. Harumframt er tað aðru ferð, at fíggjarlógin verður løgd fram, og hon er væl tugd bæði av samgongu og fíggjarnevnd, so tað skuldi ikki nervað arbeiðið, um løgmaður til dømis var burtur, sigur løgtingsformaðurin Edmund Joensen.

## Løgtingsmenn altíð klárir

Løgtingsformaðurin væntar, at Løgtingið fer til hús týsdagin. Tá Føroya Løgting fer í summarfrí, verður tað sum vant sett aftur á ólavsøku. Tingið er eitt sindur seint á veg í ár, tí tað var gamalt, at Føroya Løgting fór til hús á flaggdegnum tann 25. apríl. Men í ár er øðrvísi, nú liðið er út á hálvan mai mánaða.

– Men tingið er í prinsippinum altíð saman nú. Setan er frá ólavsøku til ólavsøku. Tingið er altíð arbeiðsført, og løgtingsnevndirnar eru altíð arbeiðsførar. Um okkurt stingur seg upp, so er alt tókt. Tingmenn eru altíð klárir, sigur løgtings-formaðurin Edmund Joensen.

Tað er ásett í stýrisskipanarlógini, at Føroya Løgting skal koma saman aftur á ólavsøku, men um okkurt óvanligt hendir áðrenn tað, so verður Føroya Løgting kallað saman áðrenn ólavsøku.